

Ingolf Rasmussen, royndur føroyskur skipari førdi granskarar, ið gjørdu kanningar av undirgrundini í Eysturgrønlandi nøkur ár herfyri, trygt fram og heimaftur. (Myndatøka Jan Müller)

# Føroyingar við til at rudda slóð fyri oljuleiting í Eysturgrønlandi

**Jan Müller**

25.12.2013 - 15:30

Oljan.fo

Nú grønlendska landsstýrið hevur latið fleiri altjóða oljufeløgum loyvi at leita eftir olju og gassi í Eysturgrønlandi munnu føroyingar neyvan gera sær greitt, hvønn leiklut vit longu hava havt í hesi tilgongdini. Tað er nevniliga ein sannroynd, at føroyingar hava sett síni fingramerki á hesa leiting longu við at rudda slóð fyri, hvar møgulig olja og gass finst í undirgrundini.

Nøkur ár herfyri leigaði Thor í Hósvík í tveimum umførum trolara til útlendskt kanningarfelag, ið gjørdi grótroyndir í Eysturgrønlandi. Saman við granskarum úr fleiri

londum var føroyskur skipari, sum hevur arbeitt í Eysturgrønlandi i mong ár. Hann tryggjaði, at granskarar komu trygt fram og heimaftur. Og við sær høvdu teir grótroyndir av havbotninum. Hesar grótroyndirnar umframt annað tilfar undir havbotninum hava síðani verið partur av fyrireikingunum hjá oljufeløgum at søkja um leitiloyvi í Eysturgrønlandi.

Altjóða oljufeløg við

Hóast eitt oljuævintýr í Eysturgrønlandi liggur langt frammi í tíðini, so er kortini sjøltil settur á, nú grønlendska landsstýrið hevur gjørt av at geva fleiri altjóða oljufeløgum leitiloyvi út fyri strondini í norðasta partinum av Eysturgrønlandi.

Og nú vit hoyra, at fleiri av teimum størstu búskapum í Asia liggja framvið at gerast partur av leiting og framleiðslu av olju og gassi í Arktis, so er greitt, at asiatisk oljufeløg hava áhuga fyri bæði Ìslandi og Grønlandi.

Stóra almenna kinesiska oljufelagið fekk herfyri loyvi at leita eftir kolvetnum í Íslandi. Nú hevur so eitt av teimum stóru japonsku oljufeløgunum fingið leitiloyvi í Eysturgrønlandi. Tað er **Japan Petroleum Exploration Co.Ltd., sum gjøgnum sítt dótturfelag Greenland Petroleum Exploration Co. hevur fingið tilluttað tveir blokkar saman við Shell, Chevron og NunaOil.**

**Talan er um tað sokallaða "Kanumas" økið, har eisini Statoil, ConocoPhillips, DONG, ENI og BP fingu leitiloyvi tillutað. Eingin brunnur er boraður í hesum fjarskotna økinum fyrr, men Statoil hevur kortini gjørt kjarnuroyndir har nøkur ár herfyri.**

**Eisini hava fleiri granskarar gjørt kanningar í økinum. Seinast var í fjør, tá Thor í Hósvík leigaði ein trolara til seismikkfelag at gera kanningar. Við føroyskum skipara umborð varð farið heilt norður í Eysturgrønlandi, har tiknar vórðu grótroyndir upp av havbotninum. Síðani varð luktað at grótinum, sum greitt hevði oljulukt í sær. Grótið er síðani kannað á granskingarstovum kring Europa. Kanningarnar eru at meta sum tær fyrstu undan boring.**

**Partur av hesi søgu er eisini, at tað er fuglfirðingurin Rúni M. Hansen, stjóri hjá Statoil við ábyrgd fyri leiting hjá Statoil í Føroyum og Grønlandi, sum fer at umsita komandi kanningarnar í Eysturgrønlandi.**










Greenland
2013/45 License
(Block 9)
2013/46 License
(Block 14)